

# Todi kundi hugsað sær at spælt aftur í Føroyum

**Todi Jónsson gloppar nú hurðina fyri møguleikanum at koma heim til Føroya at spæla, áðrenn hann gevst sum fótbóltsspælari, og hann hevur eisini gjørt sær tankar um eina yrkisleið sum venjari. Fremsti føroyski fótbóltsspælarin stríðist nú við at koma í toppform aftur eftir langan og hóttandi skaða**

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu mánaðirnir hava ikki verið serliga hugaligir hjá fremsta føroyska fótbóltsspælaranum uttanlands.

Todi Jónsson hevur enn einaferð verið plágaður av einum treiskum skaða í lærkrikanum, og tað hevur forðað honum í at spæla bólt í nærum eitt hálvt ár.

Men nú er Todi á veg aftur. Hann hevur spælt dyst á eykaliðnum hjá FCK, og hann hevur nú eyguni vend ímóti einum plássi í álopinum á superligaliðnum hjá FCK.

Men tað er kanska ikki so løgið, um Todi stúrir fyri at fáa ein álvarsaman skaða afturat næstu mánaðirnar.

32 ára gamli álopasspælarin hevur sáttmála við FC Keypmannahavn fram til summarið 2005, og skal hann leingja sáttmálan við FCK skal tað verða síðst í hesum árinum.

– Um eg nú farið at verða nógv skaddur næsta árið, so er tað helst game over hjá mær í FCK. Ein skaði upp á eitt hálvt ár merkir meira, tá ið tú ert 32 ára gamal, enn tá ið tú ert 20 ára gamal, sigur Todi.

– Um eg hinvegin kann spæla væl og gera nøkur mál í hesum árinum, so er helst møguleiki at halda fram í FCK.

## Brestur í dysti við Tur

Tað var í oktober mánaði í fjør, at ein skaði í lærkrikanum fór at gera um seg. Todi var í nærdyst við Diego Tur hjá Frem, tá ið hann merkti ein brest í lærinum. Pínan vildi ikki fara burtur, hóast heilsufólkini hjá FCK ikki dugdu at finna nakran skaða við musklinum.

Tað var ikki, fyrr enn Todi tríggjar vikur seinni gav ilt av sær í danska blaðnum BT, at ferð varð sett á viðgerðina av honum.

Við nøkrum óvanligum úttalilsum segði Todi við BT, at hann skilti ikki, hví viðgerðin av skaðanum hjá honum gekk so seint. Eingin dugdi at siga, hví hann hevði pínu í lærinum, men hann varð ikki sendur til serfrøðingar at verða kannaður.

Tá ið BT var komið á gøtuna, gekk tað skjótt við at finna Toda tíð til skanning og kanning. Men forvirringur var framvegis stórur, tí fleiri boð vóru upp á, hvat var galið við lærinum. Samstundis var framgongdin lítil og eingin, og Todi mátti enn einaferð brynja seg við toli mótvegis einum argandi skaða.

## Skaðajól í Eysturríki

Á jólum var Todi sendur til Eysturríkis at fáa viðgerð. Hetta var sama stað, sum áður hevur hjálpt honum burtur úr langtíðarskaða. Todi, sum ætlaði sær at halda jól heima í Føroyum, endaði á einum viðgerðarstovni í Eysturríki, har hann vandi um jólini og inn í nýggja árið.

– Tað er einki stuttligt at fara longri burtur á jólum, enn eg vanliga eri, men tað er einki at gera við hetta. Hetta er baksíðan av at liva av at spæla fótbólt. Hjá mær hevur tað alt at siga, at eg verði klárur aftur. Tað verður hildið, at tað er størri møguleiki fyri tí, um eg fái servenjingina í Salzburg, enn tað er, um eg bara veri heima á jólum. Soleiðis er tað bara, segði Todi, tá ið hann skuldi av stað í fjør.

Fyrstu mánaðirnar av hesum árini hevur viðgerðin og venjingin hjá Todi hildið fram. Tað hevur gingið spakuliga, men støðugt rætta vegin, og nú hevur hann vant aftur við besta liðnum hjá FCK í nakrar vikur.

## Heim at spæla

Todi gjørdist tíðliga í hesum árinum 32 ára gamal. Enn er krút í beinunum hjá fremsta føroyska spælaranum nakrantíð, men Todi er ivaleyst í holt við seinastu árini av yrkisleið sínari sum spælari.

– Eg havi altíð sagt, at eg ætli mær at spæla bólt, til eg verði 35 ára gamal, men tað veldst sjálvandi um, hvussu tað gongur við heilsuni. Verði eg nógv skaddur næstu tíðina, so er ikki vist, at eg spæli so leingi, sigur Todi.

Tí er tankin um, hvat Todi skal gera eftir eina framúr karrieru sum fótbóltsspælari, komin fram í ljósið.

– Eg kundi hugsað mær at verði venjari, og tað hevði kanska verið upplagt at byrja í Føroyum, sigur Todi og fjalur harvið ikki út yvir, at hann kanska hevur ambitiónir um at gerast venjari í útlondum.

Men tá ið hann kanska er sinnaður at gerast fótbóltsvenjari í Føroyum, er hann so eisini hugaður at spæla í Føroyum.

– Eg skal ikki útilokað, at eg komi heim at spæla eitt ár, áðrenn eg gevist, men so skal tað helst verða sum spælandi venjari. Eg veit væl, at tað er sera trupult hjá mær at koma aftur til Føroya sum spælari, tí fólk vænta nógv av mær.

– Um eg komi heim at spæla, so verður tað bara í eitt ár, tí tað verður trupult at halda støðið frá superliguni, tá ið tú venur og spælir í Føroyum, sigur Todi.

## Vanlig arbeiði og landsliðið

Tað hevur verið nógv tosað og skrivað um leiklutin – ella vantandi leiklutin – hjá Toda á føroyska fótbóltslandsliðnum. Fólk hava meiningar um hetta – summi skilja væl fótbóltsútisetan, meðan onnur siga seg ikki skilja hann.

Tað slepst heldur ikki undan at taka landsliðið fram, tá ið slík samrøða verður gjørd við Toda.

– Tað er eitt sindur strævið við teimum mongu spurningunum, sum eg altíð fái um landsliðið, viðurkennir Todi.

– Í løtuni er eingin kjansur fyri, at eg bjóði meg fram til landsliðið aftur. Kroppurin hjá mær klárar tað ikki, og tí verði eg fyrst noyddur at hugsa um felagið, har eg havi mítt arbeiði og tjeni mínar pengar.

Todi hevur tosað róliga, men nú ljóðar hann meira avgjørdur – ja, næstan eitt sindur harmur um, at fólk ikki góðtaka avgerð hansara og skilja hansara støðu.

– Skal eg spæla á landsliðnum, so má eg gevast í FCK og fáa mær eitt vanligt arbeiði fyri at klára tað, og tað vil eg ikki, sigur hann.

## Møguleiki fyri gulli

FC Keypmannahavn kláraði í fyrru hálvu av donsku landskappingini ikki rættiliga at fylgja við Brøndby, og tá ið hesar linjur verða skrivaðar, vóru framvegis nøkur stig upp til oddin, men Todi hevur ikki mist vónina um, at hann og FCK kunnu endurvinna DM.

– Orsøkin til, at vit ikki kláraðu okkum so væl í fyrru hálvu av kappingini var, at vit fingu skaðar, og aðrir spælarar steðgaðu eitt sindur upp. Vit spældu ikki væl, men kláraði hóast tað at vinna nógvar dystir.

– Tað er framvegis møguleiki at gerast meistari, tí feløg hava fyrr mist trygga leiðslu, sum tey hava havt í steðginum. Men ein treyt er so, at vit skulu spæla betur, enn vit hava gjørt. Brøndby var nógv betur enn vit í fyrru hálvu av kappingini, men nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður, sigur Todi.

FCK hevur enn einaferð verið fyri fleiri broytingum, og sentralir spælarar sum Peter Nielsen og Erik Mykland eru burtur. Todi er ein av teimum núverandi spælarunum í FCK, sum hevur verið longst í felagnum, og hann hevur upplivað, at útskiftingin hevur verið stór.

– Spælarar koma og fara, og tí er tað trupult at fáa veruligar vinmenn millum liðfelagarnar. Júst sum tú ert komin at kenna onkran, so er hann kanska burtur aftur, og so missir tú so líðandi sambandið við hann. Eg haldi, at eg havi einar tríggjar vinmenn frá tíðini í FCK.

Todi Jónsson skal komandi mánaðirnar royna at koma rættiliga fyri seg aftur sum spælari. Kappingin í FCK er hørð, men Todi hevur fyrr víst, at hann kann standa seg, tá ið harðast leikar á.



*– Um eg komi heim at spæla, so verður tað bara í eitt ár, tí tað verður trupult at halda støðið frá superliguni, tá ið tú venur og spælir í Føroyum, sigur Todi*

*Mynd: Jonhard Hammer*



# Próvtøka hvønn dag

**Hóast tað í løtuni tykist vera langur vegur til besta OB-liðið hjá Jákupi á Borg, so ivast hann ikki í, at umstøðurnar í superligufelagnum fara at menna hann sum fótbóltsleikara**

**Jákup Mørk**
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað var ein dreingjadreymur hjá 24 ára gamla Jákup á Borg, tá hann tíðliga í ár fekk møguleika at royna seg sum fulltíðar yrkisleikari*

OB er í løtuni millum tey allar bestu í donskum fótbólti.

Í skrivandi løtu eru tveir dystir leiktir av várhálvuni í donsku superliguni, og við sigrum á FC Midtjylland og Brøndby hava odensianararnir av álvara sligið fast, at teir skulu teljast millum teirra, sum nú hava sett kós móti Europa.

## Langt til liðið

Ímillum leikararnar í OB-hópinum er eisini Jákup á Borg, sum fyri fyrst er partur av einum leigumálið millum HB og danska felagið. Ein leigusáttmáli, sum Jákup sjálvandi hevur vónir um kann gerast eina meira varandi avtalu.

Enn tykist tað tó so, at vegurin til besta liðið í Odense er hampuliga langur. Sum sagt, so hava úrslitini higartil verið framúr, og sum Jákup eisini sjálvur sigur, so krevst tað kanska meira, tá hann bara er leigaður fyri nakrar fáar mánaðir.

Men hóast hetta, so tykist Jákup at stórtrívast í Odense.

– Hetta er bara super. Vit hava fingið eina góða íbúð, sum liggur væl fyri. Teinurin til venjing er stuttur, og skulu vit til handils, so er ein handilsmiðstøð eisini tætt við, og nú dama og sonur eisini eru komin niður, er alt júst so, sum eg vil hava tað at vera.

– Sjálvandi vildi eg ynskt, at eg eisini kom á liðið, men í løtuni sær tað út til, at tað mugu antin skaðar ella leikbann til, um eg skal hava nakran møguleika, men eg má bara royna at stríðast. Bara tað at venja undir slíkum umstøðum, er heilt víst við til at menna meg sum leikara. Tú mást hvønn tann einasta dag prógva, at tú ert nóg góður til at vera við á hesum støðinum, og hetta í sjálvum sær er ein stór avbjóðing, ljóðar tað úr telefonini.

## Øðrvísi tilvera

Tá leigumálið millum HB og OB gjørdist veruleiki, var hetta samstundis ein dreingjadreymur hjá Jákupi, sum rann út, og tó at hann fegnast um hetta, so ásannar hann, at tilveran sum yrkisleikari kann gerast heldur einstáttað.

– Her er at kalla hvør dagur tann sami. Vit møta eitt korter til tíggju, og so venja vit klokkan tíggju. Týs- og hósdagar venja vit so eisini seinnapart og mikudag hava vit frí. Hinir arbeiðsdagarnir steðga so á miðdegi, og so skulu vit bara syrgja fyri at hvíla.

– Ikki tí. Tað er í fínasta lagi nú, og eg haldi tað er fantastiskt, at eg fái verið so nógv saman við hesum lítla kúllinum, sum eg eigi, men skuldi talan blivið um veruligan sáttmála, so má mann helst finna sær okkurt at takast við um dagarnar. Eg síggi eisini, at fleiri av hinum leikarunum lesa onkur smávegis fak og soleiðis, so tað kundi verið, at tankarnir fara at leita tann vegin. Men fyri fyrst royni eg so bara at gera mítt besta. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur Jákup á Borg at enda.